# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

**Bilradio útsett**

Av tí at Rás2 sendur frá festivalinum við Múrin, er sendingin Bilradio úsett til komandi viku.

RÁS 2 ...títt radio

# Bussleiðin koyrt í 30 ár



*Hildebrand Midjord er ein av veteranunum sum bussførari hjá Bussleiðini. Hann koyrdi býbuss í næstan 30 ár*



*Finnur Johansen var við til at leggja Bussleiðina til rættis og kom við navninum Bussleiðin*




*Hesir tríggir Volvo VBK eru teir fyrstu bussarnir hjá Bussleiðini*




Fyri 30 árum síðan fór ein rættilig kollvelting fram í sambandi við ferðsluna í høvuðsstaðnum. Miðbýurin broyttist nógv, gomul hús vórðu tikin niður og nýggir vegir gjørdir, samstundis sum vit fingu Bussleiðina, sum í dag er ein náttúrligur partur av býarmyndini.

Ein av teimum sum var við til at leggja Bussleiðina til rættis er Finnur Johansen, sum var býráðslimur frá 1972-84. Hann var formaður í Mentamálanevndini hjá Tórshavnar býráð og limur í teknisku nevnd. Tekniska nevnd tók sær av sjálvari skipanini, men mentamálanevndin skuldi taka støðu til hvønn lit bussarnir skuldu hava, og hvussu hendan nýggja bussrutan skuldi eita.

Finnur sigur, at tað vóru fleiri uppskot uppi at venda, men tað var hann, sum tók støðu til at navnið skuldi verða Bussleiðin. Hann hevði spurt seg fyri hjá málkønum fólki m.a. Christian Matras, professara, sum helt at navnið skuldi helst hava okkurt við buss at gera, og Finnur helt at orðið leið, sum er tað føroyska orðið fyri rutu, var eitt gott orð at nýta í hesum sambandi, so hann tók avgerð um, at navnið skuldi vera Bussleiðin. Avgjørt varð eisini at bussarnir skuldu vera reyðir við ljósum taki. Bussarnir skuldu lakkerast við røttu litunum og hava navn á, áðrenn teir vórðu sendir úr Norra, har teir vórðu uppbygdir. Finnur sigur, at stórur dendur varð lagdur á, at bussarnir skuldu hava nóg stóran motor.

**mg**

# Eingin minningardagur

Seinastu níggju árini hevur fyrsti sunnudagur í juli verið minningardagur teirra deyðu í ferðsluni, men soleiðis var ikki í ár.

Stigtakarin og samskipari av tiltakinum, Ingi Gunnarsson, sigur, at sjálvur hevur hann ikki havt orku til at skipa fyri minningardegnum í ár, men hann vónar at tiltakið ikki dettur niður fyri av tí orsøk.

Fyrsta tiltakið var í 2000. Endamálið við tiltakinum var at gera vart við, at tað framvegis henda alt ov nógvar álvarsligar vanlukkur í ferðsluni og at fáa okkum at steðga á eina løtu og hugsa um hesi viðurskifti. Í fjør vórðu blómur lagdar á 183 støð kring landið, har deyðsvanlukkur eru hendar.

Ingi sigur, at hann hevur ikki tikið støðu til, um minningardagurin verður aftur í 2010, men um onkur hevur hug at skipa fyri einum slíkum tiltaki, vil hann gjarna vera við til at stuðla og hjálpa til.

**mg**



*Ingi Gunnarsson*